# Morten Olsen stúrir

Danski landsliðsvenjarin Morten Olsen er farin at stúra fyri HM-dystunum ímóti Albania og Turkalandi, eftir at nógv avboð eru komin til danska landsliðið.

Spælarar sum Kasper Bøgelund, Peter Madsen, Martin Laursen og Daniel Jensen verða neyvan førir fyri at spæla, og aðrir spælarar eru ivasamir.

– Vit hava fingið so nógv avboð, sum vit kunnu tola. Um tað koma fleiri avboð, so standa vit í eini sera óheppnari støðu, sigur Morten Olsen.

**-ek**

# Misnýtti tvey brotsspark í 8 minuttir

Mexikanski verjuspælarin Francisco de Anda misnýtti farna vikuskiftið tvey brotsspark innanfyri átta minuttir, tá ið felagið hjá honum spældi í mexikansku landskappingini. De Anda er vanliga ein tryggur brotssparksskjútti, men hendan dagin bar einki til. Fyrst skjeyt hann bóltin á stongina, og tá hann nakrar minuttir seinni fekk ein nýggjan møguleika, sendi hann bóltin upp um málið. Úrslitið av dystinum var 1-1.

De Anda eigur tó ikki metið, tí brasilski Alex brendi í 2003 fýra brotsspark í seinastu 25 minuttunum av einum dysti fyri felagið Cruzeiro.

**-ek**

# Fáa leikbann fyri ófrið

Tríggir spælarar frá portugisiska felagnum Madeira sleppa ikki at spæla fyri felagið í UEFA Cup hóskvøldið. Madeira hevur sjálvt gjørt av, at teir skulu hava leikbann, eftir at teir mánamorgunin vóru tveittir í fongsul eftir ein bardaga við løgregluna høvuðsstaðnum á Madeira, Funchal.

Løgreglan hevur skuldsett teir tríggjar spælarar fyri harðskap og fyri at hava forða løgregluni í at gera sítt arbeiði.

**-ek**

# Shearer skal halda fram

Nýggi venjarin hjá Newcastle, Graeme Souness, vil hava álopsspælaran Alan Shearer at halda fram sum spælari næsta ár. Shearer hevur róð fram undir, at hann gevst sum spælari næsta summar, men tað roynir Souness nú at broyta.

– Um Shearer kann skora 20 mál í hesum kappingarárinum, ætli eg mær at plága hann við at halda fram at spæla, sigur Graeme Souness, sum í týsdagin tók við venjarastarvinum í Newcastle.

**-ek**

# Henke søkti Celtic

Europeiska meistarakappingin í fótbólti byrjaði av álvara aftur týskvøldið, tá fyrstu dystirnir í bólkaspælinum vórðu leiktir.

Og fyri tað mesta, so háttaðu úrslitini seg soleiðis, sum roknast kundi við.

Arsenal hevði tó tørv á einum sjálvmáli, áðrenn teir kundu tryggja sær heimasigur ímóti PSV, og í Porto máttu verandi meistararnir taka til takkar við málleysum javnleiki, tá CSKA Moskva vitjaði.

Tvey av liðunum, sum nógv verður roknað av í ár, eru Chelsea og Barcelona, og tey bæði sannførdu eisini um sína styrki. Didier Drogba skeyt tvey mál, tá Chelsea vann 3-0 á útivølli móti Parsis-SG. Og Henrik Larsson kom á vøllin í seinna hálvleiki í dystinum móti fyrrverandi felagi sínum, Celtic, og hann bæði legði upp til og skoraði eitt mál, tá Barcelona vann trupla útidystin 3-1.

**Úrslitini týskvøldið vóru annars hesi**

| | |
|---|---|
| Arsenal-PSV | 1-0 |
| Celtic-Barcelona | 1-3 |
| Porto-CSKA Moskva | 0-0 |
| Inter-Werder Bremen | 2-0 |
| Panathinaikos-Rosenborg | 2-1 |
| PSG-Chelsea | 0-3 |
| Shahktar Donetsk-Milan | 0-1 |
| Valencia-Anderlecht | 2-0 |

**-jm**

# Meira FCK í Suðurafrika

Danska høvuðsstaðarfelagið hevur nú gjørt samstarvsavtalu við Santos, sum spælir í bestu suðurafrikonsku deildini

Undan hesum hevur FCK í nøkur ár havt fótbóltsskúlan, UPE-FCK í nøkur ár, men við nýggja samstarvinum er ætlanin, at FCK skal fáa enn størri gagn úr hesum skúla.

Í fyrstu atløgu er samstarvsavtalan galdandi fram til nýggjárs, og inniber hendan millum annað, at Roald Poulsen, sum er stjóri í UPE-FCK, eisini skal hava ein leiklut í talentmenningini í Santos.

**-jm**

# Gongur spakuliga hjá Toda

Tað røkist lítið fyri, at Todi Jónsson, sum herfyri varð skaddur í knænum, verður tøkur, tá føroyska fótbóltslandsliðið skal royna seg í útidystunum móti Cypros og Írlandi.

– Í løtuni dugi eg ikki at siga, hvussu langa tíð eg noyðist at bíða afturat, áðrenn eg kann venja saman við hinum. Tað gongur rætta vegin, men tað gongur spakuliga. Higartil havi eg fyri tað mesta vant á súkklu. Enn hevur tað ikki borið til at súkkla ígjøgnum, og tá sigur tað seg sjálvt, at tað er ikki hugsningur um at renna og sparka til bóltin. So tað er einki annað at gera enn at koyra á og vóna tað besta, skrivar Todi á heimasíðu síni, www.todi.fo.

**-jm**


ÓKEYPIS ATGONGD!



FRÍGGJAKVØLDIÐ
17. september 2004
DJ LASSE (DK)
HESAFERÐ: ÓKEYPIS ATGONGD OG ½ PRÍSIR ÁÐRENN KL. 24.00
18 ÁRA ALDURSMARK
eclipse
MAERSK AIR

fk Matseðilin
Hósdagin 16. sept: Hamburgarrygg
Fríggjadagin 17. sept: Bostonsteik
Leygardagin 18. sept: Svínakotelettir
Mánadagin 20. sept: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 21. sept: Fisk í fat
Mikudagin 22. sept: Saltkjøt
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari ella Búffsandwich 30,00
Matstovan í Hoyvík

Klubbadansur
Til dansin leygarkvøldið spælir:
EXPRESS
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799

i
Sosialurin

club KAGGIN
Hóskvøldið
Fluffy Toys
Ókeypis atgongd · Double Up kl. 21-22
Fríggjakvøldið
FLUFFY TOYS
Leygarkvøldið
FLUFFY TOYS
www.kaggin.fo

VERTSHÚSIÐ



Vertshúsið hevur nú eina lætta matarskrá í døgurðatímanum. Pitabreyð, hósnarungaspjót, toast osfr. Lætt, skjótt og vælsmakkandi
Fríggjakvøldið
ÓTRÚLIGA GÓÐ RESTORFFS TILBOÐ
Leygarkvøldið ROCK NÁTT
48 PAGES FRÁ KL. 23 - 01, TÁ 200 TAKA YVIR
VERTSHÚSIÐ

Áarvegur 4-10 · Postboks 107 · FO-110 Tórshavn
www.hafnia.fo



Hafnia Lounge
unplugged
Leygardagin 18. september:
Maria Guttesen Band DIVIDED MINDS frá fløguni THE LAST NIGHT frá kl. 22:30
Double Up kl. 21.00-22.00
Opið er:
mánadag – leygardag frá kl. 14:00
sunnudag frá kl. 17:00
Hotel Hafnia
Hotellið í miðbýnum

felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
GET BACK
BINGO
VERÐUR LEYGARKVØLDIÐ 18. SEPTEMBER KL. 20.00
NÁTAVEITSLA
VERÐUR LEYGARKVØLDIÐ 25. SEPTEMBER KL. 19.30
tekningarlistin liggur frammi



BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT



HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

Vikumenu
Forrættur
Kanin í Rósmaringelé, borðreitt á mildari sinnopsdressing Ruccola
Høvuðsrættur
Reyðvínsmarineraður steinbítur, innbakaður í filo, borðreiddur við fríksum grønmeti og rísi
Dessert
Eitt úrval av heimagjørdum ísi og sorbet, borðreitt í karamel kurv, við fríksari frukt og coulis.
Høvuðsrættur kr. 158,-
2 rættir kr. 198,-
3 rættir kr. 238,-
RESTAURANT MERLOT
Tel 31 11 21
Komi eisini og royni ein av okkara kjøtrættum, so sum krúnhjort, tournedos ella stórhval.

Kliché matstova
Kom og royn nakað nýtt í hugnaligum umhvørvi



tlf. 322404

AUTO 311234
Dag og nátt - Alt døgnið



LAT OKKUM KOYRA TEG TIL OG FRÁ
VIT KUNNU EISINI KOYRA ØRINDIR FYRI TEG
BENZIN · DIESEL · KIOSK
Talutíðarkort: Kall · Føroya Tele
AUTO
TEL 311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Úr Vágunum – bert eftir avtalu
• Tórshavn - Vágar – kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn – kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna – kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn – kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna – kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

Sosialurin -har tað hendir



LIVEKVØLD VIÐ DEJA VU
Hóskvøldið 16.09
Fríggjakvøldið 17.09
Leygarkvøldið 18.09
CAFÉ NATÚR
MAERSK AIR